# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Verjan skal standa sína roynd

**- Í dystinum í Íslandi lótu vit mótstøðuliðið fáa trý mál, hóast málmøguleikarnir ikki vóru serliga stórir. Tað er ikki nóg gott, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Tað, sum hevur týdning, er at fáa okkara spæl at rigga.

Føroyski landsliðshópurin kom seinnapartin í dag til Estlands, har venjingardystur verður á skránni mikukvøldið. Við heimasíðuna hjá Fótbóltssambandinum, fsf.fo, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, at føroyska liðið skal betra seg í verjustøðu.

- Avbjóðingin er at fáa verjupartin at rigga betur. Í dystinum í Íslandi lótu vit mótstøðuliðið fáa trý mál, hóast málmøguleikarnir ikki vóru serliga stórir. Tað er ikki nóg gott, og tí skal hetta fáast upp á pláss. Uppgávan hjá okkum er eisini at halda fast við teir góðu tendensirnar í framrættaða spælinum, og helst skulu vit fáa mál burtur úr møguleikunum, sum vit skapa, sigur landsliðsvenjarin.

Dysturin mikukvøldið verður tann fimti í røðini millum Estland og Føroyar. Tvær ferðir hava vit fingið javnleik, og tvær ferðir er Estland enda omaná.

- Estland hevur eitt lið, ið er eitt vet betri enn vit. Eg vildi mett, at teir eru á nøkulunda sama støði sum Ísland, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, við heimasíðuna hjá Fótbóltssambandinum.

Dysturin verður leiktur mikukvøldið 4. juni í estiska høvuðsstaðnum, Tallin. Bríksla verður í gongd á A. Le Coq Arena leikvøllinum klokkan 19.00 lokala tíð.



*Sum vant er tað verjuparturin, sum størsti denturin verður lagdur á, nú føroyska landsliðið fyrireikar seg til uppgávuna móti Estlandi í annaðkvøld*

# Besta fólkið nakrantíð

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð fara fýra teir bestu føroysku telvararnir at luttaka á olympiaduni, sum í november verður í Týsklandi**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður stinnasta landsliðið nakrantíð, sum fer at umboða Føroyar á talvolympiaduni, tá ið hon verður í Dresden í Týsklandi í døgunum 12. til 25. november.

Ongantíð áður hava fýra teir stinnastu føroysku telvararnir luttikið í olympisku kappingini í senn. Tað fara teir hesa ferð. Merkisvert er eisini, at tríggir teirra eru altjóða meistarar ella IM'-arar, sum tað plagar at verða nevnt.



*Fyri fyrstu ferð kunnu Føroyar stilla upp við trimum IM-telvarum á liðnum, ta talv-OL verður í Týsklandi í heyst*

Føroyska talvlandsliðið verður mannað við IM Helga Dam Ziska, IM John Arna Nilssen, IM John Rødgaard, FM Heina Olsen og Jóan Hendrik Andreasen. Hesin seinast nevndi fer at luttaka í talvolympiaduni fyri fyrstu ferð.

Ellivu umfør verða á skránni í Dresden, og í hvørjum umfari fara fýra telvarar at luttaka, veit Talvsamband Føroya at siga á heimasíðu síni.

## Mourinho hevur skrivað undir hjá Inter

**The Special One skal nú standa á odda fyri trífaldu italsku meistarunum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi í dag varð José Mourinho kunngjørdur, sum nýggi venjarin hjá italsku meistarunum, Inter Milan. Inter Milan boðar frá at portugisin hevur skrivað undir ein trý-ára sáttmála við Inter, og kemur Mourinho at arbeiða saman við Rui Farias, Silvino og Andrei Villas Boas. Hjálparvenjari verður Giuseppe Baresi.

Farias, Silvino og Boas vóru allir partar av baklandinum hjá José Mourinho, tá hann var venjari hjá Chelsea. Mourinho vann UEFA-Cup og Champions League við Porto, og vann enska meistaraheitið tvær ferðir við Chelsea.

## Hughes møguliga til Manchester City?

**Blackburn hevur givið Mark Hughes loyvi at samráðast við Manchester City**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Felagið hjá Gunnari Nielsen, Blackburn Rovers má helst finna sær ein nýggjan venjara. Venjarin tey seinastu 3 1/2 árini, walisiski Mark Hughes fer at byrja samráðingar við Manchester City. Stýrið í Blackburn hevur givið Hughes loyvið at hava samráðingar við Manchester City. Meðan Hughes hevur verið venjari hjá Blackburn hava teir tvær ferðir verið í FA-Cup hálvfinaluna, og tvær ferðir hava teir rokkið UEFA-cup kappingini við góðum endastøðum í Premier League. Mark Hughes hevur eisini verið nevndur millum nøvnini til tann heita venjarasessin í Chelsea.